ítróttur

Nr. 207 • fríggjadagur • 29. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Hondbóltsblað leygardagin




Hondbóltskappingin er nú tvær vikur gomul, men kortini, so verður eitt upptaktsblað við í Sosialinum leygardagin.

Tað er hondbóltsfelagið Neistin, sum í samstarvi við Sosialin, hevur staðið fyri blaðnum, sum er 36 síður til støddar. Til ber at lesa um ymsu feløgini. Hvussu tey hava fyrireikað seg til kappingina, og hvussu er statt við leikarum og øðrum.

Eisini eru serstakir tættir, sum viðgera hondbóltsvenjing og hvussu tú best fyrireikar teg til hesa, umframt at landsliðsarbeiðið í HSF eisini eigur sín sjálvsagda part.

Sum sagt, so verður blaðið at fáa saman við Sosialinum, sum kemur á gøtuna fríggjadag seinnapart.

**-jm**

# Eli vann sprint-triathlon

**Føroya Triathlon Felag skipaði sunnudagin fyri FM-Sprint triathlon, sum eisini var seinasta kappingin hjá felagnum**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

Kappingin var í Havn, og kappast var soleiðis, at svomið varð 750 metrar. Síðani vórðu 20 km súkklaðir, og at enda skuldu luttakararnir so renna 5 km.

Fyrst var svomið í Svimjihøllini í Gundadali. Liðugur at svimja, skuldi íðkarin skunda sær út á súkkluna, og súkkla frá Svimjihøllini eftir Norðara Ringvegi, fram við Strond til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C. Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 3 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins. Her var skift til renning, og runnið var frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins. Teinurin var runnin 6 ferðir.

Katrin Sørensen var fyrst úr hylinum, síðani komu Gunnar Dahl Olsen og Eli Christiansen og 1 minutt aftaná komu so Evald Rasmussen og Beinir Rasmussen. Øll komu so at siga á senn út á súkklurnar, og her vísti tað seg, sum ikki einaferð, at Gunnar súkklaði undan øllum, og var skjótt langt fremstur. Men… Gunnar tók feil, súkklaðu teinin 4 ferðir, og var sostatt seinastur út á rennirutuna. Men hann rann tó so væl, at hann megnaði at fáa eitt 2. pláss. Katrin kláraði seg heilt væl, men gjørdi sama brølaran sum Gunnar, og hevði tíðin hjá teimum verið einar 10 til 15 minuttir betri um alt gekst eftir vild. Men Eli Christiansen er føroyameistari í 1/8 triathlon, hann er ikki hvør sum helst, og móti honum er eittans mistakið nóg mikið, eisini hjá Gunnari.


*Gunnar Dahl-Olsen fór skeivur í súkklingini, og tók ein heilan umgang eyka*

Saman við triathloníðkarunum var eisini The Dream Team frá Ljósinum. Hetta eru kvinnur, sum hetta fimleikaárið stuttleika sær við at royna nógv sløg av ítrótti, sum ikki altíð hava nakað við fimleik at gera m.a. hava tær verið í Sandagerði og spælt beachwolley.

Tær royndu seg so nú á 1/12 triathlonteininum, sum verður lagaður soleiðis:

Fyrst var svomið 350 m, síðani súkklað 10 km, og so til seinast skifta til 5 km renning. Kappingin var á sama teininum sum FM kappingin, og langt er síðani so nógv fólk hava verið til eina triathlonkapping.

Men meðan tað á FM-teininum bara vóru menn, so virkaði javnstøðulógin betri hjá kvinnuliðnum The Dream Team. Her eydnaðist einum manni at vera við t.v.s hann kappaðist á teininum.

Eisini hjá hesum hendi tað, at fleiri av íðkarunum tóku feil, súkklaðu skeivt ella runnu ov langt. Venjarin Randi Kúrberg skipaði eisini í fjør fyri einari slíkari kapping, og fekk tá hjálp frá Triathlonfelagnum. Í ár slerdu Ljósið og FTF seg so saman, og sigast má, at nógv stuttligara var. Tá alt var liðugt, fingu íðkarar og hjálparfólk kaffi og kakur inni hjá Skógrøktini, sum var so beinasom at læna teimum kaffistovuna.

The Dream Team fer komandi vikuskifti til Gomlurætt at síða í berginum har. Liðið hevur fingið ein ið vanur er at síða at standa fyri, so trygdin er skal verða í lagi.

**Úrslitið hjá monnum var hetta:**

| | Navn | Svimjing | Skift | Súkkling | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Eli Christiansen | 11.30 | 2.44 | 35.16 | 23.30 | 1.13.00 |
| 2. | Gunnar D Olsen | 11.48 | 2.17 | 39.02 | 24.50 | 1.17.57 |
| 3. | Evald Rasmussen | 12.33 | 1.20 | 36.59 | 27.37 | 1.18.34 |
| 4. | Beinir Rasmussen | 13.05 | 1.31 | 37.36 | 28.38 | 1.20.50 |

**Úrslitið hjá kvinnum:**

| | Navn | Svimjing | Skift | Súkkling | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Katrin Sørensen | 10.52 | 2.33 | 55.48 | 30.21 | 1.39.34 |

**Tær/tey, ið vóru á 1/12 teininum í dag vóru:**

| | Navn | Svimjing | Skift | Súkkling | Renning | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Sigrun Davidsen | 8.43 | 4.56 | 40.41 | 20.19 | 1.14.38 |
| 2. | Marilyn Danielsen | 10.10 | 6.06 | 41.32 | 24.46 | 1.22.34 |
| 3. | Anita Højgaard | 6.54 | 5.54 | 46.06 | 23.24 | 1.22.19 |
| 4. | Malan Thomsen | 12.11 | 5.00 | 47.07 | 26.15 | 1.30.32 |
| 5. | Sunrid Johannesen | | | 43.12 | 26.10 | 1.00.10 |
| 6. | Eyvind A Hansen | 6.06 | 2.35 | 24.59 | 14.09 | 47.49 |


*Ikki er altíð so lætt at avgreiða alt sjálv, tá tú ikki ert von við slíka ítrótt*



# Tryggingin stuðlar H71


*Heðin Mortensen og Brynhild Setberg frá Tryggingarfelagnum Føroyar, og Halgir Dahl Olesen, Olaf Vesturgarð, Rúni Djurhuus og Høgni Olafsson frá H71*

**Nýggjur stuðulssáttmáli er gjørdur millum Tryggingarfelagið Føroyar og hondboltsfelagið H71 í Hoyvík. Báðir partar fegnast um samstarvið, sum eisini er ein roynd hjá Tryggingini at markera seg innan fyri hondbóltin**

SPONSORAVTALA
*Tíðindaskriv*

»Sterkir í verjuni og kontantir í álopinum« er spjaldrið, ítróttareygleiðarar hava sett á bestu hondbóltsmanningina hjá H71 í Hoyvík, sum er komin sera væl frá byrjan í nýggja kappingarárinum.

So at siga einki er farið burturav, men bara eru spælarar lagstir aftrat í hópinum hjá hoyvíkingum, ið munnu hava eina ta størstu verjuna í landinum, umframt at teir eru effektivir í álopsspælinum, har tað gongur út uppá at skora mál – uttan nakað roks!

– Eingin ivi er um, at vit í vetur hava eitt lið, sum er betri enn liðið síðsta vetur, sigur liðformaðurin hjá H71, Halgir Dahl Olesen, sum sjálvur er ein av lyklaspælarunum á liðnum.

– Síðsta ár rukku vit steypafinaluna, sum eisini var málið hjá okkum, men nú hava vit nógv fleiri streingir at spæla uppá, so tí er nýggja málið, at vit nú eisini skulu vinna okkum heiðursmerki í landskappingini.

Ei undur í, at hoyvíkingar og fólk í ovara parti av høvuðsstaðnum eru spent, nú farið er í holt við eitt nýtt kappingarár og H71 er byrjað væl. Og Halgir Dahl Olesen sigur, at tað so sanniliga eisini merkist inni á vøllinum, at áhugin uttanfyri er vaksandi.

– Tá vit spældu móti kollfirðingum herfyri, var Hoyvíkshøllin á tremur við fólki, sum vóru komin at stuðla. Har vóru nógvir kollfirðingar, men hoyvíkingarnir smæddust ikki burturímillum, og tað hjálpir okkum væl, sum skulu stríðast inni á vøllinum.

### Felag í vøkstri

Soleiðis sum Havnin er vaksin seinnu árini og eisini fer at gera tað komandi árini, er mynstrið í stuttum tað, at tað verður í Hoyvík, at tað mesta fólkið legst til. Har eru nógv nýggj hús bygd seinnu árini, og ætlanirnar um at víðka býin ganga mestsum allar niðaneftir.

– Vit hava heft okkum við, at H71 er eitt felag í vøkstri, umframt at felagið ger eitt stórt ungdómsarbeiði, siga Brynhild Setberg og Heðin Mortensen frá Tryggingarfelagnum Føroyum.

– Sjálvandi síggja vit eisini spennandi perspektiv við styrkta 1. deildarliðnum hjá H71 í ár, men ikki minst er tað við tí framskygna ungdómsarbeiðinum í huga, at vit hava valt at tikið upp stuðulssamstarv við hoyvíkingar.

Virksemi hjá H71 er líkasum í tveimum, har teir virknu limirnir eru í sjálvum hondbóltsfelagnum og hinir í stuðulsfelagnum, sum burturav syrgir fyri, at ungdómurin fær bestu umstøður at íðka hondbólt. Og limirnir eru nógvir, umleið 250 í hvørjum felagnum.

– Tað er spennandi hjá okkum at hava fingið H71 sum samstarvspartnara, tí hetta er eisini eitt slag av eini byrjan hjá okkum innan hondbóltin, eftir at vit seinnu árini mest hava fingist við at stuðla fótbólts- og flogbóltsfeløg, sigur Heðin Mortensen.

– Vit vilja ið hvussu er gera okkara til, at samstarvið eydnast væl.

Ein ítøkilig avleiðing av samstarvinum millum Tryggingarfelagið Føroyar og H71 er, at spælararnir fáa tvey sett av venjingarblusum, umframt at 200 venjingarbúnar verða seldir virknu limunum í felagnum, frá teimum yngstu til teir elstu.

# Vetrarkapping í renning

**Frælsur Ítróttur Føroya og Tryggingarfelagið Føroyar hava gjørt samstarvsavtalu um eina nýggja vetrarkapping í renning**

RENNING
*Tíðindaskriv*

Renning hevur sum ítróttagrein vundið nógv uppá seg seinnu árini. Kappingin, ið verður nevnd TF vetrarkappingin, fevnir um 6 umfør í Vágum, Streymoy, Eysturoy og Norðoyggjum, og skal eftir ætlan geva øllum teimum, ið renna, uttan mun til støði, nakað at venja til – eisini um veturin. Samstundis er tað ein sannroynd, at um tíðirnar skulu betrast, er neyðugt við venjing alt árið.

Kappingin verður skipað sum einstaklingakapping og liðkapping.

Kappast verður í fýra aldursbólkum hjá monnum og kvinnum. Teir eru:

- Veteranar kvinnur og menn (f. -1958)
- Kvinnur og menn opin bólkur (f. -88)
- Kvinnuunglingar og mansunglingar (f. 1984-88)
- Gentur og dreingir (f. 1989-93)

Lagt verður til brots á Toftum leygardagin 30. oktober. Vaksin, veteranar og unglingar renna tá teinin »Runt Agnið«, ið er 10,5 km. Yngsti aldursbólkurin rennur 5 km.

Annars vera hini umførini í TF vetrarkappingini hesi:

- **20. nov.**
  Klaksvík
  7 km/3 km
- **11. des.**
  Tórshavn
  12 km/4 km
- **22. jan.**
  Hvalvík
  7,532 km/5 km
- **19. feb.**
  Í Vágunum
  8 km/4 km, kappingin er samstundis FM í cross-renning
- **19. mar.**
  Runavík
  10 km/5 km

Tryggingarfelagið Føroyar letur heiðursmerki og T-skjúrtur til nummar eitt, tvey og trý í øllum bólkum í hvørjum umfari.

Stig verða latin luttakarunum sambært hesum stiga: 50-47-45-43-41-40-39-...1, har tann fyrsti fær 50 stig, næsti 47 o.s.v. Samlaðu kappingina vinnur tann luttakarin, ið hevur vunnið sær flest stig, tá seinasta umfar er liðugt. Tó eru tað bert fýra tey bestu umførini hjá hvørjum rennara, sum telja við.

Samstundis verður sett sum luttøkutreyt í samlaðu kappingini, at viðkomandi hevur luttikið í minst fýra umførum av teimum seks. Ein onnur treyt er, at allir luttakarir í samlaðu kappingini skulu vera limir í einum av feløgunum fyri frælsan ítrótt.

Í opna bólkinum verður skipað fyri liðkapping. Tríggir teir fremstu rennararnir hjá hvørjum felag í opna bólkinum telja við. Eins og í einstaklingakappingini eru tað fýra tey bestu umførini hjá hvørjum felagið, ið geva samlaða úrslitið.


*Tryggingarfelagið og Frælsur Ítróttur Føroya hava stig til, at frælsur ítróttur nú eisini skal íðkast um veturin*

# Vøllurin í Sumba fær andlitslyfting

**Vøllurin er í góðum standi, men orka hevur ikki verið til at røkja hann, men nú skal hann hava eina rættiliga yvirháling**

FÓTBÓLTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er ætlanin at geva fótbóltsvøllinum á Krossinum í Sumba eina rættiliga andlitslyfting.

Men tað er helst eitt, sum sumbingar ikki sleppa undan, tí fyri stuttum kolldømdi Fótbóltssambandið vøllin og vildi ikki góðkenna hann til fótbólt. Eftir nógvar tingingar aftur og fram, fingu sumbingar kortini loyvi at gera hetta kappingarárið liðugt á vøllinum.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri í Sumba, sigur, at vøllurin í Sumba er ikki so gamal og nýtslan er eisini avmarkað í eini so lítlari bygd, sum Sumba er. Sostatt er vøllurin sum so í góðum standi.

Men trupulleikin er, at orka hevur ikki verið við til at røkja hann.

Men nú skal hann hava eina rættiliga viðgerð, so at sumbingar kunnu halda fram at spæla sínar heimadystir á honum.

Ein stórur trupulleiki er, at sandurin, sum er í vøllinum, er harðnaður.

Tað, sum skal gerast við vøllin, er, at trýstspula allan vøllin fyri at reinsa allan sandin burtur. Síðani skal nýggjur sandur koyrast á vøllin.

Jacob Vestergaard sigur, at tá er vøllurin aftur sum nýggjur.

Hann sigur, at tað mesta av hesum arbeiðnum er sjálvboðið arbeiði, men á fíggjarætlanini fyri komandi ár, ætlar kommunan at seta 30.000 krónur av til at geva vøllinum eina yvirháling.

Annars ætlar kommunan at seta 100.000 krónur av á fíggjarætlanini fyri komandi ár til ítróttarendamál, eitt nú til felagshúsið hjá Sumbiar Ítróttarfelag.